

*Foreldrini hjá Jakku vóru Helena, ættað av Viðareiði og Gustav á Sundi, ættaður úr Norðradali.*

høvdu sjálvi so nógvar hønur og høvdu ikki tann stóra tørvin at keypa egg. Hetta var eisini í eini tíð, tá stórur vøkstur var í høsnarhaldinum hjá fólki kring landið. Tað var meira enn ein høna uppá hvørt fólk í Føroyum, og eggjaframleiðslan var í 1935 heilar tvær milliónir.

Men vit høvdu so høsnarhald í nøkur fá ár, og eggini vórðu seld til handlar í Havn. Tað, sum hønurnar fingu at eta, var mais og korn, sum mátti keypast. Men afturat hesum fingu tær eisini fisk, og fisk skuldi kúgvin eisini hava. Pápi róði út, so fiskin til kríatúrini máttu vit børn útvega. Men hetta var ikki bert lætt, tí tað var ikki so nógvur fiskur á Sundi. Vit vóru á seiðabergi, og vit fingu nakrar reyðfiskar við hvørt. Vit høvdu eisini nøkur fimmkvarta (tumma) gørn, sum vit settu eftir seiði. Hetta gekk, men vit skuldu fiska nokk so hugaliga, um vit eisini skuldu fáa nakað av fiski at turka til okkum sjálvi. Tað hendi seg, at kollfirðingar komu at kasta nót, og við hvørt fingu teir nakað.



*Louis Apol. Var farin í land og slapp ikki umborð aftur fyri veður. Tá hitti hann Sonnu úr Norðradali, og tað gjørdist hansara lagna.*

Esmar Fugløs, sum var mammubeiggi mín, hevur greitt frá, at hann sum hálvvaksin plagdi at vera á Sundi og ferðast. Tá plagdi hann at seta línu eftir skrubbum. Hann valdi tær størstu burtur úr, og so fór hann til Havnar at selja, og keyparin var Otto Bech. Esmar fekk so mikið burtur úr, at tað rakk til at keypa hansara fyrstu stivlar, tá hann stutt eftir fór til skips.

Tað var eisini nokk so nógvur smáállur í Kaldbaksfirði. Tað hendi seg eisini, at vit fingu so mikið av stórum álli, at vit kundu fáa eina máltíð.

## Abbin gróv sína egnu grøv á Norðadalsskarði

Abbi mín var tann sermerkti Andrias Reinert. Hann var á nógvum økjum frammanfyri sína tíð. Hann dugdi væl at yrkja og skriva, og hann yrkti nógvar tættir, sum eru útgivnir av abbasoninum Eiko Apol. Hann er mest kendur fyri, at hann hevði avgjørt, at hann skuldi verða jarðaður á Norðadalsskarði. Hann hevði grivið sína egnu grøv og hevði eisini steinsett hana. Hetta frættist um landið, og einaferð fekk abbi brævi frá tí kenda DD, sum væl skilti hann. Hann helt, at abbi kundi koma at liggja har, hann var barnvaksin og njóta útsýnið og lurta eftir áartutlinum. Abbi var tó ikki so sentimentalur, og hann helt hetta vera nakað tvætl. Var ein fyrst deyður bar ikki til at lurta eftir nøkrum áartutli!

Her kann verða skoytt uppí, at abbi var gubbi Hans Bærentsen, bóndasonin á Sundi. Hann plagdi at skemta við Hans, at hann skuldi ikki verða kløkkur, tá hann einaferð í framtíðini fór burtur í haga, at hoyra kvøðing úr grøvini hjá honum!

Abbi søkti myndugleikarnar um at fáa grøvina góðkenda.

Hetta var í lagi, men tað vóru so nógvar treytir um víging, stiking og viðlíkahald av grøvini og eina árliga prestavitjan, at hann slepti hesi ætlan. Hann vildi ikki áleggja sínum eftirkomarum hetta stríðið. Tískil er hann grivin í Kaldbak, har innskrivtin á hansara gravsteini er: »Hann vildi á Norðradalsskarði ligið, men hetta forðaði byrokratiið«.

Hann hevði sjálvur yrkt ein sang til jarðarferðina, og hesin varð eisini sungin. Hann doyði í 1939.

Hesin sangur er so sjáldsamur, at hann verður endurgivin her:

*Lag: Gak under Jesu Kors at staa*

*Jeg skal nu bort fra eder gå,*
*naturens orden er nu så.*
*Jeg drager bort hjem til min Gud,*
*som mig har skikket dødens bud.*

*Min arbejdsdag har været lang,*
*snart lys og blid, snart mørk og trang.*
*Men aldrig svigtede mit mod,*
*ihvad der end så forestod.*

*For sidste gang I ser mig her,*
*i verden sker det aldrig mer.*
*Jeg håber dog at vi engang*
*skal mødes hist med jubelsang.*

*Farvel I mine venner kær,*
*både langt fra båre og som er nær.*
*Tak for hver stund, vi sammen kom,*
*Gud unde Jer alle en skæbne from.*

*Jeg siger verden nu farvel,*
*til himlen længes nu min sjæl.*
*Jeg hvile vil blandt mine fjeld,*
*der altid glæded mig så vel.*

*Jeg havde fjender, som var gram,*
*der undte mig al last og skam.*
*Men de var få og ikke fler,*
*dem jeg tilgiver en og hver.*

*Går så afsted i Jesu navn*
*og før mig til min grav og havn,*
*hvor jeg skal hvile til dommedag.*
*I Guds hånd sætter jeg min sag.*

## Gott at vera barn á Sundi

Vit fluttu inn í eini gomul hús, sum vóru á Sundi. Grundin stendur enn.

Vit vóru nokk so nógv fólk í húsi. Sjálvi vóru vit átta. Arbeiðskona var, og abbi kom viðhvørt, so vit vóru 9-10 fólk í húsi. Húsini vóru lítil, ein lítil stova og køkur í neðra, og vit svóvu øll á loftinum.

Tann fyrsti, sum búði í okkara fyrru húsum á Sundi var Jóannes Bærentsen. Hann var beiggi Enok Bærentsen, sum var pápi einasta føroyska amtmannin Christian Bærentsen. Ein annar beiggi teirra bygdi gamla Danmark á Skálatrøð. Síðan búði ein sum æt Langi Johan úr Havn her. Aftaná tað var vist ein, sum kallaðist Pinku Johan, sum búði í húsinum. Beint undan okkum búði ein sum kallaðist Koltur her. Hann æt Johan og var úr Koltri. Tað var týðiligt, at ein av teimum, sum hevði búð í húsinum, hevði verið skómakari. Vit funnu fitt av sállaleðri í húsinum.

Seinni bygdu vit okkum kortini eini nýggj hús í 1938-39.

Á Sundi var eisini ein gamal bóndagarður, sum verður umrøddur í komandi blað.

Tað mundi vera ein knappur kilometur millum húsini, so okkara hús stóðu rættiliga einsamøll. Telefonstøðin var á bóndagarðinum, so hagar máttu vit fara, tá ringjast skuldi ella ringt varð til okkara. Tá kom onkur av garðinum við telefonboðum.

Vit høvdu kúgv, men hon var ikki í kjallaranum, sum annars var tað vanliga. Vit høvdu hoyggjhús føst í húsini, og her var kúgvin eisini.

Tað var nógv samband við bóndahúsið. Har vóru átta børn, og vit vóru seks børn. Tað var skjótt at renna ímillum, og vit spældu nógv saman.

Higar komu eisini systkinabørn úr Havn at ferðast, og tað verður



*Trý ættarlið í Norðradali.*
***Aftara rað f.v.:** Óli, Andrias og Gustav*
***Fremra rað:** Andrea, Charlotta, systir Andrias, Nordina, Johanna, Jens, Óli í Gortri og Jana.*
*Óli í Gortri er fyrsta ættarlið. Andrias, Johanna og Charlotta eru annað ættarlið. Hini eru børn hjá Jóhonnu og Andrias og eru triðja ættarlið.*



*Sanna sum hitti Louis úr Hollandi á kafeini, og hon bíðaði eftir honum, til hann kom aftur.*